Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jóhannis Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Súsanna Bertholdsen, landsstýriskvinna í heilsumálum

Evni: Fleiri kommunulæknar og heilsutænastur nærri fólkinum

Spurningar:

1. Hvussu gongur við ætlanini at styrkja heilsutænasturnar runt landið?
2. Hvussu nógv nýggj kommunulæknastørv eru sett í hesum samgonguskeiðinum?
3. Hvussu nógv kommunulæknastørv er ætlanin at seta í heyst?
4. Nær verður nýggja kommunulæknastarvið í Vágum sett?
5. Eru ætlanir um, at m.a. sálarfrøðingar verða partur av heilsutænastunum á heilsudeplunum í framtíðini?

Viðmerkingar:
Samgongan hevur sum mál at styrkja kommunlæknaskipanina og heilsuskipanir kring alt landið. Hetta er ein liður í eini bygnaðarbroyting, har víðkaðar heilsutænastur verða veittar á m.a. heilsudeplum. Endamálið er skjót og góð heilsubót og fyribyrging móti kostnaðarmiklum tungum sjúkragongdum á sjúkrahúsunum. Um hetta eydnast, verður spennandi at síggja, men málið er gott og greitt.

Ein liður í hesum arbeiði er at seta fleiri kommunulæknar í starv. Í fleiri ár hevur verið víst á, at ov fáir kommunulæknar eru í Føroyum, og fólkatalið er nógv vaksið seinastu árini.

Fyri at fáa at vita hvussu langt Heilsumálaráðið saman við kommununum er komið við hesum málinum, verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 16. september 2025

Jóhannis Joensen